# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Dagurin í morgin

**16. desember. Lázarus**. Vinmaurin í Betania, sum Jesus vakti upp frá deyðum (Jóhs. kap. 11). Ein halgisøga sigur, at hann seinni doyði friðarliga, ein onnur at hann varð hálshøgdur undir Domitianus keisara.

## Tøkk

Øllum tykkum, sum á ymsan hátt mintust
og gleddu meg á 75 ára degnum,
takki eg hjartaliga.
Eisini vil eg nýta høvið til at ynskja
tykkum øllum eini gleðilig jól og eitt
eydnuberandi nýggjár.

**Blíðar heilsur**
**Erling Hansen, Fuglafjørður**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu
tá okkara góði maður og abbi

**Knút Erling Háberg**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar, peningagávur til Kristnastovu
og til Sangkórið í Ebenezer.
Tøkk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til
við jarðarferðina og øllum tykkum,
sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Sunneva, Knút og Sunneva**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri samkenslu og hjálp,
tá ið kæra mamma, vermamma og omma okkara

**Elin Frederiksberg**
Klaksvík

varð sjúk, doyði og varð jarðað.

Tøkk til starvsfólkini á Klaksvíkar sjúkrahúsi,
Landssjúkrahúsinum og Hotel Tórshavn,
fyri hjálp og umsorgan.
Tøkk til Hans Eiler Hammer og Pól Johannesen,
fyri góð og troystarrík orð.
Eisini ein tøkk til kirkjutænararnar og gravarar.
Tøkk til tykkum mongu, sum hjálptu so væl til
á einhvønn hátt.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávur
til KFUM og K.
Hjartans tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni
til hennara seinasta hvíldarstað.

**Ása, Harald, Elsa og Ebbe**

# Til minnis um Knúd Thorsvig



Týsdagin 8. november 2005 andaðist ein av fyrrverandi starvsfeløgum okkara, Knúd Thorsvig, prentari, 61 ára gamal, eftir at hava verið álvarsliga sjúkur í nøkur ár.

Knút lærdi til prentara á Landsprentsmiðjuni í Havn. Hann arbeiddi sum prentari bæði í Føroyum og eitt skifti á stórari prentsmiðju í Danmark.

Umframt at arbeiða sum prentari í Gamla Bókahandli, arbeiddi hann eisini á fleiri av tíðindabløðunum, sum høvdu sína egnu prentsmiðju. Eitt skifti hevði hann sína egnu prentsmiðju heima.

Knúd gekk høgt upp í sít fak sum prentari, og var hann í fleiri ár formaður í Føroya Prentarafelag. Hann var fakfelagsmaður og dugdi sera væl at samráðast og fáa góðar sáttmálar fyri felagið.

Hann fylgdi væl við í tí sum fyrifórst í samfelagnum. Hann hevði sínar avgjørdu meiningar og dugdi sera væl at grundgeva fyri teimum og leggja síni sjónarmið fram.

Knúd var góður ítróttarmaður. Hann spældi borðtennis í felagnum Roynd, og hann var vinstri bakverjii í HB í mong ár. Hann byrjaði á dreingjaliðnum í 1956, og hann kom á fremsta liðið í 1963. Har spældi hann í 1963, 1964 og fyrra helmingin av 1965. Øll hesi árini vann HB FM heitið. Eftir at hann hevði verið burturi frá fótbólti í nøkur ár, var Knút aftur á besta HB liðnum í 1970.

Hann umboðaði tríggjar ferðir Føroyar á landsliðnum. Fyrsta dystin spældi hann í 1964, tá ið hann 19. juli var við móti Íslandi B í Gundadali. Í 1970 spældi hann báðar dystirnar á útivølli. Teir vóru móti Orknoyum og Hetlandi.

Hann var limur í Havnar Klubba, og var hann ein av dugnaligu billardspælarunum har og luttók í fleiri kappingum.

Foreldrini hjá Knúd vóru Oluffa, f. Poulsen, av Eiði, og Ejler Thorsvig, sum var dani. Knúd var yngstur av systkjunum, hini eru: Poul Erik, sum býr í Danmark, og Solveig Arge, sum býr í Havn.

Knúd var giftur Maritu, dóttir Tullu og Åge Dahl, urmakara í Havn. Marita og Knúd fingu dóttrina Anniku, sum er gift Eyðuni, ið eisini hevur fingið sær eftirnavnið Thorsvig. Knúd var sera góður við familjuna og gekk høgt upp í síni abbabørn.

Seinasta arbeiðsplássi hjá Knúd var á Sosalinum á Argjum, har hann koyrdi stóru rotatiónspressuna. Hann arbeiddi á Sosialinum í fleiri umførum, har hann fyrst og fremst var á prentsmiðjuni, men hann tók eisini eina hond í við umbróting og reproviðgerð í blaðhúsinum. Øll vistu hvar man hevði Knúd. Altíð fryntligur, altíð trúgvur og gjørdi sítt arbeiði til fulnar. Hann var eisini ein góður starvsfelagi, tí hann var sosialur og góður at tosa og vera saman við. Hann gørdi sítt til at fáa lív og ró í eitt annars stressað arbeiðspláss. Øll starvsfólk vóru góð við Knút. Saknur er í honum.

Friður veri við minninum um Knúd Thorsvig.

**-red**

Fólkakalendarin 2006:

# 12 tey elstu - ein fólkakalendari




**Anna K. Højgaard, fotografur í Hoyvík, er komin á marknaðin við "Fólkakalendaranum 2006" ið er ein sera snotuligur kalendari við myndum av 12 teimum elstu fólkunum í Føroyum um árskiftið 2004/2005**

**KALENDARI**

Hvussu síggja tey elstu fólkini í Føroyum út?

Við hesum forvitnisliga spurninginum í viðførinum ferðaðist Anna K. Højgaard, fotografur, um árskiftið 2004/2005 kring landið og avmyndaði tey elstu fólkini í Føroyum.

Tey gomlu eru ein rættiliga ósjónligur partur av okkara samfelag. Tú sært tey ikki á gøtuni longur, kanska tí at heilsan er farin at bila og beinini viknað.

Kortini eru tey framvegis ein livandi og gevandi partur av okkara gerandisdegi, um tey so framvegis búgva heima hjá sær sjálvum, á stovni, ella hjá eftirkomarum.

Í einum samfelag, har ungdómsmentanin er í hásæti, hevur fotografurin vent linsuni móti teimum elstu borgarunum í landinum. Foyrutu andlitini og talandi eygnabørgdini siga frá stórum og smáum hendingum og sorg og gleði eftir eitt langt, langt lív.

Tey 12 fólkini í kalendaranum vóru millum 98 og 103 ár, tá myndirnar vórðu tiknar. Sambært Landsfólkayvirlitinum vóru tey millum tey elstu í Føroyum um hetta mundið.

Føroyski Fólkakalendarin kostar 100 kr. og fæst til keyps í bókabúðum og øðrum handlum kring landið.